# Grønland og Føroyar fáa egin beinleiðis nummur til Veteranmiðstøðina

**Nú fáa veteranar og avvarðandi bæði í Grønlandi og Føroyum síni egnu beinleiðis telefonnummur til Veteranmiðstøðina í Danmark. Sostatt kunnu tey fáa ráð, hjálp og vegleiðing frá Veteranmiðstøðini alt samdøgrið uttan at gjalda útlendskan telefontakst.**



*Veteranar og avvarðandi í Grønlandi og Føroyum skulu – við nýggju telefonnumrunum – ikki longur gjalda útlendskan telefontakst, tá ið tey vilja hava samband við Veteranmiðstøðina í Danmark. Mynd: Forsvarsministeriet*

Higartil hava veteranar og avvarðandi goldið útlendskan telefontakst, tá ið tey skuldu hava samband við Veteranmiðstøðina í Danmark, men soleiðis er ikki longur. Frá í dag kunnu veteranar og avvarðandi seta seg í samband við Veteranmiðstøðina og bara gjalda heimatakst – sama hvar í ríkisfelagsskapinum tey eru.

"Tænasturnar hjá Veteranmiðstøðini skulu vera væl atkomiligar hjá veteranum og avvarðandi allastaðni í ríkisfelagsskapinum. Tí er tað positivt, at veteranar og avvarðindi bæði í Grønlandi og Føroyum nú fáa síni egnu beinleiðis telefonnummur, so tey sleppa undan at gjalda útlendskan telefontakst, tá ið tey hava brúk fyri góðum ráðum ella bráðfeingis hjálp og stuðli frá Veteranmiðstøðini", sigur oberstur Kim Simonsen, stjóri á Veteranmiðstøðini.

**Altíð ein at tosa við**

Er tín fyrispurningur ikki átrokandi, og tú sum veteranur í Grønlandi ella Føroyum vilt hava atgongd til øll tilboð hjá Veteranmiðstøðini um ráðgeving, hjálp og stuðul, kanst tú fáa gagn

av at seta teg í samband við okkum vanliga avgreiðslutíð (danska tíð). Tað er mánadag-týsdag kl. 08:00-16:00, mikudag-fríggjadag kl. 08:00-15:00 (danska tíð).

Er talan um bráðtørv kanns tú uttan fyri hesar tíðir ringja til sosialráðgevararnar á Veteranmiðstøðini. Tey svara alt samdøgrið allar ársins 365 dagar.

Tey starvsfólk á Veteranmiðstøðini, sum svara samdøgurstelefonini, hava drúgvar royndir og eru útbúgvin til at ráðgeva og stuðla í telefonini.

**Býrt tú í Grønlandi?**
Tú, sum býrt í Grønlandi, kann seta teg í samband við Veteranmiðstøðina á +299 582304

**Býrt tú í Føroyum?**
Tú, sum býrt í Føroyum, kann seta teg í samband við Veteranmiðstøðina á +298 916161

Býrt tú í Danmark, kanst tú sum higartil ringja til Veteranmiðstøðina á 7281 9700

**Tal á veteranum í Grønlandi og Føroyum**
Í mai 2024 eru 42.032 veteranar skrásettir í øllum ríkisfelagsskapinum – av teimum búgva 117 í Grønlandi og 40 í Føroyum.

**Fakta um Veteranmiðstøðina**
Veteranmiðstøðin hjálpir, stuðlar og ráðgevur veteranum og avvarðandi bæði áðrenn, meðan og aftaná, at tey eru útsend. Veteranmiðstøðin hevur víðfevnda tænastu til veteranar og avvarðandi og fær áheitanir um alt frá stuðli til sosialráðgeving, arbeiðsráðgeving og fíggjarliga ráðgeving til viðgerð hjá sálarfrøðingi, parterapi, familjuráðgeving og mangt annað.
Sosialráðgevararnir á Veteranmiðstøðini eru ein av yrkisbólkunum, ið fær flest áheitanir. Í 2023 fingu sosialráðgevararnir á Veteranmiðstøðini sostatt meira enn 10.000 áheitanir.